## Nýggjar mánamyndir

Í hesum døgum eru 40 ár liðin síðani, at amerikumenn fyrstu ferð lendu á mánanum. Mikil ivi hevur verið um, hvørt hetta veruliga hendi ella um hetta bert var gykl fyri øllum heiminum. men nú hevur Nasa kunngjørt nakar myndir, sum skulu prógva, at ørnin veruliga lendi á mánanum. Myndirnar eru tiknar av rúmdarskipinum Lunar Reconnaissance Orbiter, og tær vísa lendingarfarið frá Apollo 11 júst har, sum Neil Armstrong og Buzz Aldrin lendu í juli 1969. Myndirnar eru tiknar millum 11. og 15. juli í ár, og Nasa kunngjørdi tær fríggjadagin.



## Obama í mótráki

Talið av av teimum, ið treytaleyst stuðla Obama, fellur støðugt. Fyri fyrstu ferð síðani valið er talið av teimum, ið halda at Obama klárar seg væl, follið niðurum 60%. Hetta eru heili 10 % færri enn í vár, vísa meiningakanningar. Tað er serliga hátturin, Obama hevur tikið sær av fíggjarmálum og lovaðu broytingarnar innan heilsuverkið, sum enn ikki eru framdar, sum fáa fólk at missa álitið á forsetanum, skrivar Ritzau. Bert 59% halda nú, at Obama klárar seg væl. Men hóast fólk byrja at missa álitið á Obama, so eru tey tó ikki farin yvir til Republikanarnar. Bert 36% halda, at republikanararnir klára seg væl.

# Føroyskt sushi fær góða móttøku

**Tað hevur gingið langt betur enn væntað við nýggju sushi- og vínbarrini Etika á Áarvegnum. Nógvu vitjanirnar kunnu ikki bara vera nýfingni, tí somu fólkini koma aftur og aftur, sigur stjórin Johannes Jensen**

SUSHI
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*




*Sushi- og vínbarrin Etika á Áarvegnum hevur fingið óvæntaða góða móttøku*

Tá ið nýggja sushi- og víonbarrin Etika á Áarvegnum læt upp fyri tveimum vikum síðan, grunaði eingin, at ráur fiskur fór at fella so nógvum føroysum gómum, sum royndirnar longu nú eru.

- Tað hevur gingið nógv, nógv betur enn væntað, og vitjanirnar eru so nógvar, at neyðugt er at bíleggja borð, bæði á middegi og um kvøldið, sigur Johannes Jensen, stjóri á Etika.

Heilt nógvir útlendingar hava verið og fingið sær ein bita í nýggju matstovuni, men størsti parturin av gestunum hevur verið føroyingar.

Johannes Jensen sigur, at tey allar flestu hava verið væl nøgd, og hann hevur fingið fleiri heilsanir bæði frá føroyskum og útlendskum gestum um, at føroysku sushirættirnar standa ikki aftan fyri sushi í øðrum londum.

Hugsast kundi, at nógvu vitjanirnar kunnu tulkast sum, at fólk eru nýfingin, men tað er ikki bra tað, tí sambært starvsfólkunum vitja somu fólk aftur og aftur, sigur Johannes Jensen.

Hann heldur, at væl dámdu matvørurnar ikki minst skulu setast í samband við, at dygdin á føroyska vatninum og fiskinum er so høg.




*Fallið er stórt, men longu næsta ár fer at ganga framá í íslendska búskapinum, siga nýggjastu búskaparmetingarnar*

# Íslendski búskapurin veksur aftur í 2010

**Sambært seinastu forsøgnunum hjá íslendska fíggjarmálaráðnum, verður talan um búskaparvøkstur í 2010**

BÚSKAPUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hetta framgongur av greining, sum er latin OECD, og sum eisini er endurgivin á heimasíðuni hjá føroyska Landsbankanum.

Íslendska fíggjarmálaráðið metir m.a. fyri 2009, at tøka inntøkan hjá íslendsku húsarhaldunum, minkar 11% og arbeiðsloysið verður 9% í miðal. Privata uppsparingin er økt og eftirspurningurin lækkaður. Almenna og privata nýtslan minka ávikavist uml. 21% og 25%, og fyri búskapin sum heild verður mett, at BTÚ minkar við 10,6% í 2009.

Roknað verður við BTÚ-vøkstri á 0,5% longu í 2010, hóast privata nýtslan framhaldandi verður lutfalsliga lág. Høvuðsorsøkin til hesa vend skyldast serliga stórar íløgur í orkuframleiðslu.

Í 2011 verður BTÙ-vøksturin mettur til 5%, serliga orsaka vøkstri í privatari nýtslu og íløgum. Men harumframt betrar viknaða íslendska krónan um kappingarevnið, og útflutningurin væntast at økjast so mikið, at talan verður um handilsjavnaavlop í 2011 svarandi til uml. 6% av BTÙ. Eftirspurningurin verður sostatt í størri mun enn áður rættaður mótvegis innlendis framleiðslu heldur enn innflutningi. Við hesum hava íslendskar vørur og tænastur kappingarfyrimun, og summir íslendskir framleiðarar eru hervið minni raktir av kreppuni enn annars.

Forsøgnin fyri 2012-2014 vísir ein árligan vøkstur í BTÙ á 2,6%, lágan og støðugan prísvøkstur á uml. 2,5% og eitt gjaldsjavnahall á 1,5% av BTÚ. Arbeiðsloysið væntast at verða 4% í miðal tá búskapurin aftur kemur í javnvág.

Pipar&Salt:

# Áskoðararnir gjørdi tað lætt



Eitt av høvuðsnøvnunum við Múrin vóru teir víðagitnu skemtararnir úr Pipar-&Salt. – Tað var sum at surfa á einari bylgju av góðum stemningi, sigur Sjúrður Skaale.

Eitt av høvuðsnøvnunum, og helst mest vitjaða konsertin við Múrin var tann hjá skemtarunum Sjúrður Skaale og Jákup Veyhe. Við einari ørgrynnu av frálíkum tónleikarum trinu teir á pall í Kirkjubø fríggjakvøldið, og sjáldan var eins góður stemningurin at síggja í Krikjubø, sum tá Esmar Eysturoy og companí vóru á palli.

- Áskoðararnir vóru so fantastiskir og gjørdi tað lætt hjá okkum at framføra. Tað hevði neyvan gingið so væl sum tað gjørdi, um áskoðararnir ikki vóru so heitir uppá okkum, sigur Sjúrður Skaale.

### Pylsuvognurin koppaði

Hóast konsertin var framúr, so vóru nakrir smávegis trupulleikar á pallinum. Millum annað datt tann vælkendi pylsuvognurin í høvdi á songkvinnunum, men eingin skaði stóð av hesum.

- Vit gjørdi nakrir smávegis feilir á pallinum, men vit høvdu vant nógv við tónleikarunum, so tað vistu vit frammanundan fór at koyra væl, sigur Sjúrður Skaale.

Og tónleikararnir vóru eingi aðrir enn Jóhannes á Rógvi, Kim Hansen, Jens Marni Hansen og James Olsen. Við øðrum orðum Showmenn.

Spurdur um hvørt Pipar&Salt verða at síggja á palli aftur skjótt, sigur Sjúrður Skaale, at hann ongar viðmerkingar hevur, tó leggur hann dent á, at uppliving við Múrin var nakað fyri seg og ótrúliga væl eydnað.